# Teitur í upptøkuhøli í sól og marglæti



El Cortijo sunnaliga í Spania. Upptøkuhølini, ið eru ein sonn glæstribrog, eru bygd til endamálið. Her skal Teitur Lassen í næstum taka upp

**Teitur Lassen hevur skrivað sáttmála við Universal Music um tvær fløgur. Og upptøkurnar fara fram í upptøkuhølum, ið eru ein sonn glastriborg, ið liggur væl undir bláum himni og sól. Og heimsins heitastu nøvn vitja javnan henda heita marglætismiðdepil fyri tónleik, t.d. Mariah Carey og Bjørk og Roxette**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*

Fríggjadagin skrivaði Teitur Lassen, tónleikari, undir sáttmála við heimsins størsta plátufelag, Universal Music.

Teitur er nú í Los Angeles. Tvær fløguútgávur fevnir sáttmálin um og verða tær givnar út á altjóða fløgumarknaðinum.

### Sól og marglæti í glastriborg

Beint fyri ólavsøku lat Teitur úr hondum fløgu til føroyska marknaðin. Hendan nevnist Sólin og Regnið.

Men undir upptøkunum sunnaliga í Spania verður neyvan talan um regn, men hinvegin sól. El Cortijo upptøkuhølini eru í Suðurspania, Andalusia, Costa del Sol. Næsti býur, ið er 10 minuttir burtur, nevnist San Pedro. Høvuðsbýurin er Sevilla. Og annar býur tætt hjá er Granada.

Og umstøðurnar eru framúr. Ein glastriborg av aðrari verð, ið er bygd til endamálið, nevniliga at hýsa heimsins heitastu nøvnum undir upptøkum undir heitum, bláum himni.

El Cortijo The Spanish House Recording Studio nevnast upptøkuhølini. Og tað eru ikki smávegis høli. Á heimasíðuni hjá El Cortijo sæst, hvussu kringumstøðurnar eru. Frá stóra ljómpultinum sæst út ígjøgnum hválv og í baksýni er heiður himmal. Sama sjón sæst, tá sangarin stillar seg til mikrofonina og hyggur út ígjøgnum hválvvindeygað.

Sjálvt upptøkuhølið, har tøknin er, er sera flott við útsýni til Miðjarðahavið. Og umstøðurnar annars eru framúr, sæst á heimasíðuni. Himmalsengur og svimjihylur. Sum heild minnir alt mest um eina glæstriborg, har høgt er til loft og vítt er til veggja. Sum ferðamálini, sum tey flestu bert vitja í dreymum.

Og eyðkendi blái liturin við suðurlandsstrendur er eyðkendur og sermerkir myndina.

Umframt stóru gongirnar, rúmini, svimjihylin og himmalsengurnar og flottu umstøðurnar annars, so er eisini egin køkur og heimasíðan hjá El Cortijo veitir eisini upplýsingar um hesi viðurskifti.

### Heitt og heit nøvn

Teitur skal arbeiða saman við kenda framleiðaranum Rupert Hine, ið hevur starvast við t.d. Tinu Turner og Suzanne Vega.

Og tað eru eisini heit nøvn, ið vitja niður til heita Spania og upptøkuhølini El Cortijo. Heimasíðan upplýsur, at millum vitjandi og væl nøgdu stjørnurnar, ið nýta – og óivað eisini njóta – El Cortijo, eru nøvn sum Mariah Carey, The Manic Street Preachers, Björk, Sade, Underworld, Goldie, Tricky, Howie B, Nellie Hooper, Ash, Tito & Tarantula, Babybird, Meja, Roxette, dEUS, Compay Segundo og Duncan Sheik.

Umframt nýta fremstu sponsku tónleikastjørnurnar eisini upptøkuhølini El Cortijo.

Sólin og Regnið, nýggja føroyska fløgan hjá Teiti Lassen er komin á føroyska marknaðin, meðan sólin enn sær í Føroyum. Nú er tað stóra fetið tikið á leiðini hjá Teiti áleiðis móti lívsdreyminum, sum hann hevur miðað ímóti. Og undir sponsku sólini eru umstøðurnar tær best hugsandi, meðan ein fríløta kann njótast í svimjihylinum, himmalsongini ella í vakra landslagnum.

Tónleikurin, ið sigst vera tann kassaguitarmerkti, ið vit kenna Teit fyri, er tó tað, ið telur mest í hesum marglætisumstøðum, men betri umstøður kann ein neyvan droyma um, tá lívsdreymurin skal umsetast til veruleika.



*Sum heild minnir alt mest um eina glæstriborg, har høgt er til loft og vítt er til veggja. Sum ferðamálini, sum tey flestu bert vitja í dreymum*

## Listastevnutíðindi 2002

### DISNEY – FYRSTU FERÐ Í EVROPA

Samstarvandi partur í Listastevnu Føroya er biografurin Havnar Bio.

Í samráð við stýrið fyri Listastevnu Føroya er aftur í ár hepnast biografinum at fáa nýggjar góðar filmar, sum ikki hava verið sýndir í Føroyum áður.

Millum hesar filmar eru eisini barnafilmar. Ein teirra, "Lilo og Stitch" er nýggjur Disney teknifilmur. Hin 10. august verur hesin filmur fyri fyrstu fer sýndur í Evropa!

Sýningarstaður er Havnar Bio.

Í filminum, sum fær framúr ummæli, er ein hópur av Elvis-sangum. So her er ein rættur filmur bæði fyri faðir og son, móðir og dóttir.

Hvønn leygardag og sunnudag, meðan Listastevnan er, verða barnafilmar sýndir í Havnar Bio. Umframt Disney filmin "Lilo og Stich", er talan um Spielberg-filmin "Spirit of the Cimmaron" sum hin 17. august verður sýndur fyri fyrstu ferð í Norðanlondum.

Triði barnafilmurin á Listastevnuni er danski "Úlvagenten Tinka". Hetta er nýggjur danskur stórfilmur, sum byggir á søguna "Hungerbarnet" hjá Cecil Bødker. Filmurin um Úlavgentuna Tinku verður eisini sýndur í Suður Bio á Tvøroyri og í Atlantis í Klaksvík.

### BESTI ÚTVARPSLEIKURIN

Leygardagin verður avdúkað, hvør vinnur hálvt hundrað túsund krónur fyri besta handritið til útvarpsleik.

Kappingina útskrivaði Listastevna Føroya í samstarvi við Útvarpið. Hvør, ið eigur vinnandi handritið, verður avdukað undir setanini av Listastevnu Føroya, leygardagin klokkan 14.

Í dómsnevndini, sum mettu um innkomnu handritini, sita Eyðun Johannesen, Lív Jacobsen, Heðin M Klein og Høgni Joensen.

Útvarpsleikurin, sum byggir á vinnandi handritið, verður sendur í Útvarpinum leygarkvøldið eftir V4-dráttin klokkan 19.00.

Í fjør skipaðu somu partar, Listastevnan og Útvarpið, fyri stuttsøgukapping. Innkomnu søgurnar vórðu givnar út í bók, "Mjørki í Heilum", sum Bókadeild Føroya Lærarafelags stóð fyri. Við tað høvið vann Hanus Kamban fyrstu virðisløn fyri stuttsøguna "Angels Place".

Umframt, at vinnandi handritið í ár verður gjørt til útvarpsleik, arbeiðir Útvarpið eisini við tveimum øðrum handritum, sum komu inn til kappingina í sambandi við Listastevnu Føroya í ár.

### SIGVART DAGSLAND VITJAR

Á Listastevnu Føroya 2002 medvirkar norski sálmasangarin Sigvart Dagsland

Annan stevnudagin, sunnudagin 4. august, verður konsert í Høllini í Norðurlandahúsinum við kenda norska sangaranum Sigvart Dagsland. Hann er úr Stavanger og hevur givið út eina røð av fløgum á plátfelagnumm Kirkelig Kulturverksted. Seinastu tíðina hevur Sigvart samstarvað við svenska gittaraleikaranum Georg "Joje" Wadenius. Við sær til Føroya hevur Sigvart hesi fólk: Eilif Stene, Karl Olof Wennerberg og Torjus Vierli.

Á Listastevnuni syngur Sigvart Dagsland norðurlendskar sálmar, sum vit øll kenna, umframt nútíðar gospel og popp, har nærvera er lyklaorðið. Hann bjóðar eina andaliga uppliving, sum nemur hvørt hjarta, ið hevur áhuga fyri norðurlendsku sálmunum, frá Grundtvig til Linu Sandell. Millum kendastu útgávur Daglsands er "Det er makt i de foldede hender".

Sunnudagin 4. august í Høllini í Norðurlandahúsinum kl. 19:30 Kostnaður 150 kr.



# Løgmaður vil gera upp við gamla verjupolitikkin



*– Løgtingið hevur áður samtykt, at Føroyar skulu verða uttan fyri allar hernaðarligar felagsskapir, men nú haldi eg, at tíðin er komin at viðgera hetta av nýggjum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður*

**– Landsstýrið vil hava innlit og ávirkan á verjumál, ið viðvíkja Føroyum, og seinni í hesi tingsetuni fer løgmaður at taka stig til aðalorðaskifti um tann føroyska trygdarpolitikkin. Málið er, at Føroyar skulu verða meira virknar í verju- og trygdarmálum**

VERJUMÁL
*Eyðun Klakstein*

Løgmaður fer í næstum at taka stig til, at Føroyar fáa ein meira virknan lut, tá tað ræður um trygdarmál á føroyskum leiðum.

Anfinn Kallsberg ætlar at fáa í lag eitt aðalorðaskifti í løgtinginum um føroyska verjupolitikkin, og málið er at fáa undirtøku fyri, at føroyingar fara meira aktivt inn í verjupolitiska samstarvið í NATO.

– Vit hava áður sagt, at Føroyar vilja ikki verða við í NATO ella nøkrum líknandi felagsskapi, men tað ber heilt einfalt ikki til at vera uttanfyri. Fortíðin vísir, at tá vit siga, at vit vilja einki hava við slíkt at gera, so verður alt bara dult fyri okkum, sigur Anfinn Kallsberg.

– Løgtingið hevur áður samtykt, at Føroyar skulu verða uttan fyri allar hernaðarligar felagsskapir, men nú haldi eg, at tíðin er komin at viðgera hetta av nýggjum. Vit eiga heldur at fara aktivt við í samstarvið í NATO og fáa tað innlit og ta ávirkan, sum vit kunnu.

### Skulu vit hvat hendir í Føroyum

Anfinn Kallsberg segði í løgmansrøðu síni á ólavsøku, at eitt týdningarmikið stig til at fáa meira innlit og ávirkan hevði verið, um umboð fyri landsstýrið kundi verið eygleiðari á øll um fundum í NATO, sum snúgva seg um Føroyar og leiðunum kring okkum.

– Danski verjumálaráðharrin, sum júst hevur verið á vitjan í Føroyum, helt, at sjálvandi skulu føroyingar vita, hvat gongur fyri seg her í landinum, og tað er út frá hesum, at vit halda, at vit áttu at verið við sum eygleiðari í NATO, tá tað snýr seg um okkum ella okkara leiðir, sigur Anfinn Kallsberg.

– Politikkurin hjá landsstýrinum er, at vit skulu ikki vera nakar trygdarvági fyri okkara grannar, og tí eiga vit eisini at verða við í trygdarsamstarvi. Men sjálvandi mugu vit eisini ásanna, at hetta er eitt felagsmál í ríkisfelagsskapinum.

Men heldur tú, at føroyska skipanin er til reiðar at vera við í slíkum samstarvi, har tað mest skal haldast loyniligt fyri almenninginum?

– Nei, tað er hon ikki sum er, men tað er eisini nakað, sum vit skulu arbeiða við. Hernaðarmál er serlig, og tí skulu vit í Føroyum eisini finna mannagongdir og skipanir, sum kunnu tryggja Føroyar kunnu verða við í verjupolitiskum samstarvi.

Høgni Hoydal:

# Skuldsetingarnar eru tiknar aftur

**Hóast Tórbjørn Jacobsen hevur sátt iva um, hvørjar skuldsetingar hann tók aftur ólavsøkudag, heldur formaðurin í Tjóðveldisflokkinum at málið er úti av verðini, og næstu tíðina skal tað snúgva seg um veruligan politikk**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Formaðurin í Tjóðveldisflokkin kennir seg sannførdan um, at teir trupulleikar, sum á ólavsøku hóttu við at slíta samgonguna, endaliga eru fingnir út av verðini.

Hetta sigur hann, hóast Tórbjørn Jacobsen í Degi og Viku týskvøldið sáddi iva um, hvørjar skuldsetingar hann veruliga hevði tikið aftur í brævinum, hann sendi løgmanni ólavsøkudag.

– Eg havi tosað við partarnar í málinum eftir tíðindasendingina hjá Sjónvarpinum, og eg havi fingið váttan fyri, at tær skuldsetingarnar, sum gjørdust til eitt samgongumál, eru tiknar aftur, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum.

– Vit hildu alla tíðina fast um, at hetta var eitt mál, sum teir involveraðu partarnir sjálvir skuldu loysa, men málið gjørdist til eitt floks- og samgongumál, tá ið tað varð sett upp á spíssin og hótti við at slíta samgonguna.



*– Eg havi tosað við partarnar í málinum eftir tíðindasendingina hjá Sjónvarpinum, og eg havi fingið váttan fyri, at tær skuldsetingarnar, sum gjørdust til eitt samgongumál, eru tiknar aftur, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldisflokkinum*

### Avleiðingarnar

Høgni Hoydal heldur, at næstu tíðina skal samgongusamstarvið verða í miðdeplinum, og flokkarnir skulu aftur til at viðgera tey mál, sum ósemjur eru um. Tað vil við øðrum orðum siga, at samgongan skal aftur til at føra veruligan politikk og semjast um kósina í teimum ymsu málunum.

Men er hetta ikki ein keðiligur máti at byrja eina nýggja samgongu uppá?

– Summi mál útvikla seg knappliga til at involvera alla tað politisku skipanina, og tað er greitt, at eitt slíkt mál reisur nógvar spurningar. Men tað skulu vit viðgera og arbeiða við komandi tíðina.

Fær hetta málið nakrar avleiðingar frá støðuna hjá Tórbirni Jacobsen í Tjóðveldisflokkinum?

– Tað havi eg onga viðmerking til. Tað er greitt, at tað eitt mál kann føra til samgonguslit, so verður tað eisini eitt floks- og samgongumál.

# Fyrra hálvár royndist væl hjá Norðoya Sparikassa

**Norðoya Sparikassi hevði avlop upp á 12,2 milliónir krónur áðrenn skatt fyrstu seks mánaðirnar í ár. Tað er ein millión meira enn somu tíð í fjør**

SPARIKASSI
*Eyðun Klakkstein*

Leiðslan í Norðoya Sparikassa er sera væl nøgd við úrslitið av virkseminum fyri fyrra hálvár í ár. Fríggjadagin kom hálvársroknskapurin, sum er tann fyrsti hjá føroysku peningastovnunum í ár.

Fyrru seks mánaðirnar í ár góvu sparikassanum í Norðoyggjum eitt avlop upp á 12,2 milliónir krónur áðrenn skatt. Hetta er ein millión krónur betur enn í fjør.

Inntøkurnar hjá Norðoya Sparikassa vuksu fyrra hálvár í ár. Netto rentuinntøkurnar fóru úr 25,6 mió. kr. og upp í 25,5. Netto kostnaðarinntøkurnar hækkaðu eisini nakað upp í 26,7 mió. kr.

Útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting hækkaðu við meira enn einari millión fyrstu seks mánaðirnar í ár. Tað er ein vøkstur, sum svarar til 10,3 prosent. Høvuðsorsøkin til hetta er meirvirðisgjaldið, sum nú verður lagt á tænastur frá Elektron. Tá hesar útreiðslur verða roknaðar frá, eru útreiðslurnar hjá sparikassanum heldur minni í ár, enn tær vóru í fjør.

### Eginpeningurin økist

Avskrivingar og burturleggingar ímóti tapi av útlánum og ábyrgdum vóru 2,1 mió.kr. ímóti 3,3 mió. kr. í 2001.

Norðoya Sparikassi sigur seg hava sum mál at reka ein varnan útlánspolitik, og í dag eru 3,9% av samlaðu útlánunum og ábyrgdunum sett av ímóti tapi upp á skuldarar.

Eginpeningurin hjá Norðoya Sparikassa er seinasta árið øktur við 20,7 mió.kr. og er nú 213 mió.kr.

Gjaldføri hjá sparikassanum er sera gott, og solvensurin er framvegis høgur.